HEILDARÆTLAN FYRI FRÆLSIÐ 20



15.01.2025

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA, FRÆLSIÐ 20

1. INNGANGUR 3
FRÓÐSKAPARSETRIÐ Í FRAMTÍÐINI 3
TOYMI OG BYGNAÐUR 4
TÍÐARÆTLAN 4

2. UPPRUNASTØÐI 5

ARKITEKTUR 5
VÍDD OG ÆTLAN 6

3. NÝGGJA KAMPUSØKIÐ 7

NÝGGJ SAMBOND 7
FLEKSIBILITETUR 7
ÚTIØKI 7
BURÐARDYGD 8
BYGGIHÁTTUR OG BYGGISTIG 8

4 VINNANDI UPPSKOTIÐ FRÁ SNA 9

5. FRÆLSIÐ 20 Í FRAMTÍÐINI 11

TVØRFAKLIGT SAMSTARV 11
FLEKSIBILITETUR OG FLÓÐ 11
NÝTT FLÓÐ - VATNRØTT 11
NÝGGJ FLÓÐ LODDRØTT 12
NÝGGJAR FLATMYNDIR 13

6. UPPSKOT TIL FRAMTÍÐAR FRÆLSIÐ 20 14

SERSTOVUR 15
ÍTRÓTTARHØLL OG AULA 18
UNDIRVÍSINGARSTOVUR OG BÓLKARÚM 20
FELAGSØKI OG UPPIHALD 22
SKRIVSTOVU- OG STARVSFÓLKAHENTLEIKAR 24
RAKSTUR OG VIÐLÍKAHALD + TØKNI 26
GARÐAR 28
SAMLEIKI 32

1. INNGANGUR

SNA Arkitektar vunnu í oktober 2024 kappingina um eina heildarætlan fyri Frælsið 20. Uppskotið var valt við einum felags ynski um at transformera verandi skúla til ein serstakan og tíðarhóskandi part av framtíðar Fróðskaparsetri Føroya. SNA hevur skipað fyri brúkaraverkstovum, har ymisku deildirnar, leiðsla og viðlíkahaldstoymi eru hoyrd.

Heildarætlanin nágreinar fortreytirnar fyri verkætlanini og setur karmarnar fyri víðari arbeiðinum.

- Strategiska kampusætlanin (HLT 2018)
- Frælsið 20
- Økis- og tørvsgreining
- Burðardygd
- Transformatiónsprinsipp
- Brúkararundir
- Kanningar av rúmligum og funktiónellum møguleikum í dagførdum kørmum.

Heildarætlanin er grundarlagið undir tilgongdini av ítøkiligu byggiskránni. Heildarætlanin vísir á fortreytirnar fyri arbeiðinum og á møguleikar, avmarkingar og arkitektonisku dygdirnar í verkætlanini.

Vónin er, at hetta tilfarið kann skapa eitt felags tilvit um teir mongu spennandi møguleikarnar fyri Frælsið 20 og eggja til konstruktivt kjak, menningarmøguleikar og ábyrgd av felags framtíðar kørmum fyri Fróðskaparsetur Føroyar.


FRÓÐSKAPARSETRIÐ Í FRAMTÍÐINI

Føroyar uppliva í hesum tíðum eina ovur stóra menning og vøkstur, men samstundis eina fráflyting av vitandi ungum. Ungfólk fara til Danmarkar ella aðra staðni at útbúgva seg, og bert gott helvtin kemur heim aftur. Vónin er, at fleiri útbúgvingar kunnu takast her, og at tey, ið longu eru flutt av landinum, koma heim aftur. Ynski er eisini at eggja útlendskum lesandi, granskarum og undirvísarum at koma til Føroya.


Sum lýst í kampusætlanini frá 2018 er tað "...*eitt týðiligt og greitt felags mál, um at skapa eitt 'sense of community', sum í løtuni tykist ógreitt...*"
Arkitektururin, útbúgvingar- og granskingarmøguleikarnir skulu lyftast upp á eitt altjóða støðið. Vit eru væl á veg við skúlum sum t.d Glasir og Skúlanum av Fløtum. Tey ungu skulu verða verandi, og tey evnaríku lokkast higar - hendan tráan skal raðfestast.

Frælsið 20 skal ikki vera ein umbygdur fólkaskúli, men ein topp-modernaður, hugkveikjandi og serstakur partur av framtíðar Fróðskaparsetri Føroya.





Glasir, BIG 2018



Mærsk tårnet, C.F Møller 2021




Skúlin á Fløtum, SNA / Zeta / Brim 2020



Mærsk tårnet, C.F Møller 2021



Kalvebodfælled Skole, Lundgaard & Tranberg 2018



Aarhus Arkitektskole, 2021



Gothenburg University, Cobe 2028



*: Neyvari lýsing av byggitíðariskeiðnum, tá endaliga vavið á bygaistiganum er kent

TOYMI OG BYGNAÐUR. Bygnaðurin, í mun til verkætlanina, er yvirskipað lýstur høgrumegin. Byggiharrin er Landsverk, og hevur evstu ábyrgd av verkætlanini. Byggiharrin skal tryggja, at verkætlanin verður útint sambært viðtøkunum og avgerðum hjá leiðsluni.

Stýrisbólkurin hittist regluliga og annars eftir tørvi. Prosjektleiðarin frá Landsverk luttekur á fundunum eftir áheitan, og kunnar stýrisbólkin um tilgongd, fíggjarviðurskifti, tíðarstýring, sáttmálaviðurskifti, komandi arbeiði. Stýrisbólkurin tekur støðu til møgulig tilmæli frá arbeiðsbólkinum um neyðugar at- og avgerðir.

Fyri bygginevndina verður reglulig fundarrøð avtalað. Kunnað verður um gongdina, faklig- og brúkaraviðurskifti verða umrødd. Fakliga ráðgevingin skal tryggja at umstøðurnar gerast egnaðar til tørvin hjá brúkarunum á Fróðskaparsetri Føroya. Bygginevndin kann geva tilmæli til stýrisbólkin í hesum sambandi.

Projekteringsleiðarin samskipar projekteringina, sum ásett í avtalu við Landsverk, við teimum átøkum, sum eru neyðug, í einstøku fasunum. Projekteringsleiðarin vísir til prosjektleiðaran. Projekteringsleiðarin hevur ábyrgdina av myndugleikaloyvum. Projekteringsleiðarin stýrir projekteringstíðini og stýrir fíggjarviðurskiftunum í mun til fíggjarkarmin. Møguligar ósemjur, ið ikki kunnu loysast í prosjketeringstoyminum, kann prosjekteringsleiðarin lyfta upp til stýrisbólkin.

Ráðgevingin verður skipað sum deild ráðgeving sambært ráðgevingaravtalu og ABR 89 og í galdandi 'Ydelsesbeskrivelse for Byggeri og planlægning'.

Lyklapersónarnir ið SNA hevur knýttar at málinum, er Inga Katrin Winther, sum arkitektur við málsábyrgd og ein prosjekteringsleiðari.

TÍÐARÆTLAN. Tíðarætlanin, er yvirskipað lýst høgrumegin. Tilgongdin veriður lýst sum brúkaratilgongdin í mun til verkætlanina.

Sum fyrsta part av tilgongdini, hevur SNA arbeitt við eini Heildarætlan í samband við verkætlanina.

Fleiri brúkarafundir hava verið við luttakarum frá Fróðskaparsetur Føroya, og eru ymisk viðurskifti vend.


Við støði í uppskotinum um eina Heildarætlan, eru vídd og vavi, tørvsráðlegging og grunddømi av rúmum/konseptum viðgjørd, saman við brúkarunum.

Brúkarin verður eisini tikin við seinni, tá arbeitt verður við uppskotsfasuni, har neyvari innrætting av hølum, staðsetingar av veggum og innleggingum, verða gjøgnumgingnar.

At endar verða viðurskifti viðvíkjandi føstum og leysum innbúgvi eisini umrødd saman við brúkarunum, tá sjálv byggiverkætlanin er farin í gongd.

Á hendan hátt tryggja vit okkum at neyðugu upplýsingarnar frá brúkarunum, koma til røttu ásettu tíð.

Eftir ætlan verður verklagslógin góðkend í Løgtinginum í apríl 2025, hareftir at farast kann undir verkætlanartilgongdina. Fyrst við Byggiskrá og Skipanaruppskot fyri allan bygningin. Síðani verður farið undir Prosjektuppskot, For- og Høvuðsprosjekt fyri avmarkaðan part av bygninginum, áðrenn hesin parturin verður boðin út í januar 2026.



MERKISLÝSING:

ÁBYRGD/AVGERÐARTAKARI ⟶ SAMSKIPAN ····· SAMTALA/SAMSKIFTI ⟷

2. UPPRUNASTØÐI

ARKITEKTUR. Kappingaruppskotið byggir á ansni fyri verandi bygningi og fyri arbeiðnum hjá MAP á Lon 5. Ynski um at varðveita og transformera skúlan sæð úr einum burðardyggum sjónarhorni tykist skynsamt, eins og tær byggilistarligu dygdirnar skúlin hevur, eru verdar at byggja víðari á. Skúlin er í dag niðurslitin og ótíðarhóskandi - bæði funktiónelt, tøkniliga og estetiskt - men kortini hevur hann stórt potentiali og menningarmøguleikar.

Tí leggur hetta uppskotið ikki upp til stórar niðurtøkur og nýggjar arkitektoniskar afturatbyggingar við heilt øðrvísi og ókendum skapi. Bæði byggitekniskt og fíggjarliga eru greiðir fyrimunir við at tillaga nýbyggingarnar til tað verandi, við virðing fyri upprunaliga skúlanum.

Uppskotið er púra greitt, - hóast skúlin er niðurslitin og bygdur eftir reglufastari skipan frá 60'unum - er einfalt er at tilllaga seg skipanina og strukturin. Møguligt er at víðka og leggja nýggj løg afturat, sum lyfta skúlan upp á eitt tíðarhóskandi støðið.

Við hesum uppskotinum verða tær verandi arkitektonisku dygdirnar varðveittar og víðari mentar:

- Nógv dagsljós
- Rúmligar dygdir við hæddarskiftunum í 'gøtuni' (Lon 8)
- Høg loftshædd og suðurvendar fasadur til undirvísing
- Breið gongsøkir og uppihald við nógvum ljósi móti norði
- Greið og logisk skipan

Og við uppskotinum hjá SNA verður hesar dygdir lagdar afturat:

- Atgongd fyri øll - allastaðni
- Tilfar - timbur og litir
- Ótroyttu møguleikarnir í gørðunum
- Sermerki í framsíðunum og eitt burðardygt íkast
- Gjøgnuskygni - eitt hús við fult av spennandi virksemi
- Samanhangandi infrastrukturur / flóð - ongar blindgøtur














VÍDD OG ÆTLAN. Hvussu samsvara verandi bygningar við ynskini hjá Fróðskaparsetrinum til nýggja undirvísingar bygningin?

Verandi fimleikahøll verður tikin niður so pláss verður til nýggja felagsbygningin (Henning Larsen), hinvegin kann verandi skúli brúkast aftur allur sum hann er. Við hóvligum tillagingum og broytingum kunnu verandi undirvísingarhøli í lonunum brúkast framyvir, eins og niðara hædd í lon 1, 5, 6 og 7, kunnu innrættast til uttan stórvegis inntriv. Í yvirlitinum høgrumegin, sæst at samlaða víddin í verandi skúla er umleið 7000m²

Yvirliti høgrumegin, sum vísir hølistørv og funktiónir fyri skúlan, er uppgjørt í nettotølum. Tað vil siga uttan veggir, gongir, vesi o.a. Tølini lýsa yvirskipaða grundarlagið fyri komandi arbeiðnum. Fleksibilitetur í stovum sum kunnu leggjast saman, býti, bókingarskipanir og annað - eisini tvørtur um kampus - kann broytast í komandi fasum.

Sum ásett, eru vanligar skúlastovur settar til umleið 50m², sum er mest vanliga støddin á undirvísingarhølum í verandi bygningi. Um tørvur er á størri hølum ella møguleika fyri at leggja stovur saman er neyðugt at gera op í berandi veggir, ella teir í støðum verða tiknir niður.

Serstovurnar verða í framtíðini í stóran mun staðsettar í nýbygningunum, har neyðugar loftshæddir, krøv til tøkni og víddir betri kunnu lagast til tørvin. Hesar eru mettar at verða 90m².

Skrivstovurnar eru ymiskar í støddd - og spenna í vídd frá at rúma einum starvsfólki til at størri ”skrivstovulandsløg”, har fleiri starvsfólk kunnu sita saman. Tí er tað helst rættari at kalla tað ’arbeiðispláss’ heldur enn skrivstovur. Rúm er ikki fyri at øll kunnu ikki fáa egna skrivstovu, hóast tað kundi verið ynskiligt, tað eru heilt einfalt ikki útveggir til tess. Í nýggju lon 5 eru skrivstovunar á niðaru hæddini innrættaðar í gomlu lestrarkømrunum og eru tí rímuliga stórar - 12m². Í heildarætlanini er eitt ’arbeiðispláss’ í miðal 10m².

Hetta merkir at ynski eru um eina samlaða netto vídd á góðar 5800m². Á tí reyðu flatmyndini høgrumegin er víst, hvussu býti av ’netto-undirvísing’ og ’brutto-vídd’ er í einari vanligari lon nú.

Niðanfyri er samlaði tørvurin á bruttofermetrum roknaður sum víddartørvur falda við verandi brutto/nettofaktor sum er 1,74. Hetta er møguliga í hægra lagi - tí helst ber til í framtíðini brúka partar av verandi flóðskipan (trappur og gongir t.d).

Men - við fortreytunum, sum áður eru lýstar, - at tillaga seg verandi bygningsskipan og samstundis transformera bygningarnar við virðing fyri upprunaliga bygnaðinum - ber ikki til at nærkast eini tummilfingra-reglu fyri nýbygging t.d. á einum brutto/nettofaktori sum eitur 1,33.

Við einum faktori á 1,74 er tað tí tørvur á umleið 3200m² av nýbýgging - undantikið felagsøki og møguliga nýggja ítrottahøll.

Við kappingaruppskotinum og innleiðandi útgreiningunum av rúmskipanini í huga, verður mett, at verkætlanin rúmar framsóknu ambitiónunum hjá Fróðskaparsetrinum fyri bygningin. Men heldur ikki nógv meira enn tað - uttan at fara á kompromis við tær fortreytirnar fyri verkætlanina, sum heildarætlanin lýsir.

vídd verandi skúli (br.)

Eksklusiv LON 9 (samkomuhøll) og LON 10 sum verður niðurløgd.

Víddin er leysliga og tikin frá Støðulýsingini HMP Consult gjørdi í 2014.

LON 1-7	6515 m2
LON 8 (gong)	400 m2
TOTAL	**6.915 m2**

mettur tørvur (nt.)

Mettu víddirnar fyri funktiónsbýti eru absolutt nettotøl uttan skilaveggir, útveggir, gongd, trappur osfr.

Býtið av hølum byggir á hølisyvirliti frá kappingarskránni og tørvslýsingar frá brúkaraverkstovunum


	vanlig høli (~50 m2)	serhøli (~90 m2)	skrivstovur (~10 m2)	bolkarúm + fundur (~15 m2)	goymsla + print (~15 m2)
DHS	**7**	**3**	**40**	**8**	**4**
NÁD	**20**	**14**	**40**	**10**	**8**
NVD	**11**	**6**	**40**	**8**	**5**
TIL SAMANS	**38**	**23**	**120**	**26**	**17**
estim. areal	1900	2070	1200	390	255
TOTAL					**5815 m2**

brutto / netto faktor í verandi

Reyða økið fevnir um nettoøkið fyri undirvísing, skrivstovur o.s.fr. í verandi lon. Tvs. uttan felagsøki.

Her er býti útroknað frá einari hædd frá innrættingini hjá MAP av LON 5.

615 m2



= 1,74

353 m2

mettur tørvur (br.)

Við at falda metta tørvin við givna brutto/nettofaktorin, fáa vit eina mynd av víddartørvinum fyri virksemið hjá deildunum, íroknað útveggir, innveggir, gongd, trappur o.sfr. - uttan felagsøki.


5815 m2 x 1,74 = 10.118 m²

nýbygging (br.)


Neyðug øki sum nýbygging fyri undirvísing + nýbygging fyri felagsøki + ítróttarhøll (~1400m²).

10.118 m2 - 6.915 m2 = 3.203 m²
+ 1.400 m²
TOTAL = 4.603m²

3. NÝGGJA KAMPUS







Innleiðandi skitsu-visualisering frá kappingaruppskotinum hjá SNA

Svalagongdin er nýggja andlitið fyri Frælsið 20, og vendir sær út ímóti univerisitetstorginum. Aftanfyri gjøgnumskygdu framsíðuna sæst lívið í húsinum. Lesandi og starvsfólk ferðast millum hæddirnar og møtast í opna rúminum. Pergolan knýtir bygningin saman við nýggja felagsbygninginum og framtíðar víðkanini av setrinum hinumegin torgið.

Andlitið, er ein opin og ljós framsíða, ið týðiliga vísir lív, virksemi og fjálga rúmið á setrinum. Arbeitt verður víðari við sniði og útsjónd longri frammi í tilgongdini.

NÝGGJ SAMBOND. Við strategisku kampusætlanini frá 2018, komandi felagsbygninginum og transformatiónini av Frælsinum 20, verður farið undir eina neyðuga endurnýggjan av Fróðskaparsetri Føroya. Í kampusætlanini eru ynski um eitt opið og atkomuligt universitet við samanhangandi og sermerktari landslagssviðgerð og byggilist.


Í ætlanini verður lagt upp til, at bygningarnar á økinum fyrst og fremst savnast um eitt nýtt býarrúm inni á økinum - soleiðis at 'hjartað' og høvuðsinngongdinar verða savnaðar um eitt univerisitetstorg. Í hesi verkætlan verður framvegis atgongd til tað eyðkendu auluna á Frælsinum, men høvuðsinngongdin verður flutt til suðurvenda torgið, sum savnar felagsbygningin og Frælsið 20.

Fróðskaparsetrið fevnir um fleiri ymiskar bygningar, men liggur í einum samanhangandi landslags- og býarkervi við natúrligum og flótandi sambondum sínámillum.

FLEKSIBILITETUR. Sambandi millum bygningarnar skal eggja til rørslu og fleksibilitet tvørturum bygningar og deildir; øll skulu hava atgongd til alt kampus - og øll deila teir mongu hentleikarnar. Á henda hátt ber til at effektivisera og gagnnýta hentleikarnar á besta hátt og samstundis fremja avgerandi tvørfakligt samstarv.

Tí verður mælt til, at ein yvirskipað støða verður tikin til alt virkisføri á skúlanum - og ikki bert at avmarkað hvønn bygning ella deild fyri seg. Hvussu verður tryggjað, at alt tilfeingi verður gagnnýtt á besta hátt? Á brúkaraverkstovunum var undirtøka fyri at ávísar serstovur kunnu brúkast av fleiri ymiskum fakbólkum, fyrilestrarsalir, verkstøð, bólkarúm, kaffistovur o.s.fr. verða innrættaði við hesum í huga.


ÚTIØKI. Sum lýst í kampusæltanini, verður arbeitt fyri at skapa ein arktektoniskan skyldskap tvørturum bygningarnar. Veruleikin er tó, at kampusøkið eisini í framtíðini fer at verða eitt samansett øki; nýtt, transformera, gamla gróthúsið, Vinnuháskúlanum osv. Tí er tað týdningarmikið, at útiøkini - also býar- og landslagsætlanin er samanhangandi og sterk. Í arbeiðinum við Frælsinum 20 er hetta tikið við.



heildarætlan fyri ljósseting



heildarætlan fyri innbúgv




heildarætlan fyri álegging



fríløtur í gørðunum



býarrúm fyri øll



torg, sum eggjar til rørslu



eitt savnandi torg



livandi garðrúm

BURÐARDYGD.

Ein fortreyt fyri framtíðar Frælsið 20 er, - umframt virðing fyri og menning av verandi arkitekturi og áður nevndu øki/funktiónsviðurskiftini - ein burðardygg tilgongd til transformatiónina. Avgerðin um at varðveita bygningin heldur enn at javna hann við jørðina er grundleggjandi skilagóð, og hendan avgerð eigur eisini at vera stýrandi fyri komandi arkitektoniskar og byggitekninskar viðgerðir.


Burðardyggu loysnirnar skulu, sum nevnt í kampusætlanini, vera sjónligar og samleikaskapandi fyri framtíðar Fróðskaparsetrið - her vera framtíðar borgararnir útbúgvnir, sum skulu leiða Føroyar trygt inn í framtíðina!

Tí er grundarlagið fyri transformatiónina av Frælsinum 20, arkitekturur, sum tekurstøði í burðardyggum loysnum: timbur, CLT (cross-laminated timber), natúrlig ventilatión, dagsljós, sólsellur og aðrar grønar loysnir.


















BYGGIHÁTTUR OG BYGGISTIG.

Verandi skúli er uppbygdur kring eina regluliga skipan, sum ger at tað møguligt at byggja til við einum einføldum og rationellum byggisystemi, sum bæði er skynsamt fíggjarliga og burðardygt.

Ein møguleiki kann verða at byggja millumbygnigarnar, sum einfaldar berandi konstruktiónir og løtt forvirkaði dekk- og framsíðuelement í CLT, sum lættliga kunnu lyftast inn millum verandi bygningar.

Í byggitíðini verður møguligt at brúka flestu partar av verandi skúla, ímeðan tað nýggja verður bygt. Nýggju millumbygingarnar eru smærri ískoyti, sum ikki ávirkað grundarlagið á verandi bygningi.







Diagram av nýbygging. Verandi skúli er gráður við 'gøtuni' vístari við reyðum. Nýggju bygningarnar standa sum lættar konstruktiónir í millum.



Verandi skjøldrar verða partvíst latnir upp. Trappur verða tiknar vekk (vístar við ljósareyðum) og takið verður skorið til har nýtt verður bygt. Fundament verða stoypt millum lonirnar og rammukonstruktiónin verður reist.



Løtt dekkelement og skilaveggir verða lyft inn. Trappurnar í svalagongdini koma í staðin fyri tær gomlu.




Takelement verða lyft uppá pláss. Omanfyri gróðurhúsini framvið gøtuni verða ervaljós. Framsíður verða settar upp og bygningurin verður gjørdur liðugur innan.

4. VINNANDI UPPSKOTIÐ FRÁ SNA


HUGSJÓN. Hóast bygningurin á Frælsinum 20 er niðurslitin, rúmar hann góðum arkitektoniskum dygdum. Bygnaðurin er ógvuliga greiður og bygningurin tillagar seg hegnisliga lendishæddarmunin á staðnum - harumframt er tað frá einum burðardyggum sjónarmiði skilagott at varðveita og transformera hann til annað virksemi.

Í hesum uppskotinum verður greiði bygnaðurin og berandi skipanin endurnýtt. Sum framhald av greiðu bygnaðarligu skipanini verða einføld átøk gjørd samsvarandi verandi logikki. Við skynsomum og burðardyggum byggisystemi fær Frælsið 20 ein samanhangandi infrastruktur við meiri plássi, rúmligum fjølbroytni, felagsøkjum og ljósi. Harumframt verður tætt samband við restina av kampus og við nýggju grønu útiøkini.


NÝBYGGING. Verður bygd upp at og millum lonirnar- og nertur ikki við verandi konstruktiónir. Greiði bygnaðurin í betong verður bundin saman við løttum, gjøgnumskygdum millum bygningum úr timbri. Á diagramminum markerað við grønum liti meðan verandi gong, gøta, er víst reyð.



ATKOMUVIÐURSKIFTI. Núverandi gongd frá høvuðsinngongdini knýtir lonirnar saman omaneftir. Lonirnar liggja í fimm hæddarniveaum omaneftir. Verandi rampur eru ov brattar og fylla nógv í gongsrúminum.




FLÓÐKORT. Við nýggju millumbygningunum millum lonirnar verða øll gongsøkini bundin saman í eina heild. Svalagongdin sum knýtir lon 5, 6 og 7 saman er eisini bundin saman við nýggja felagsbygninginum hjá setrinum.




NÝTT VIRKSEMI. Í millumbygningunum eru undirvísingarhølini ymisk í støddum og hava hægri loftshædd á ovaru hædd. Í lon 5, 6 og 7 eru skrivstovur, bólkarúm osfr. í niðaru hædd.

Gøtan, sum í dag knýtir lonirnar saman verður víðka við millumbygningunum. Ljósu gróðurhúsini (markeraði við hjørtum) rúma felagsøkjum við kaffikrókum, lesiplássum, borðfótbólti osfr. Her verður latið uppp millum hæddirnar og samband er út í innaru garðarnar.




FIMLEIKAHØLL. Á fríøkinum ímóti Frælsinum verður tekjan á auluni longd norðeftir og ein nýggj fimleikahøll verður staðsett. Í kjallaranum í lon 1 verða innrættaði umklæðingarrúm, venjingarhøli, tøkni oa. Felagsøki og umstøður til lesandi við bólkarúmum, studentakafé og uppihaldsrúmum verða á 1. hædd.

Fimleikahøllin kann latast upp ímóti auluni og Fróðskaparsetrið fær eitt stórt høli har øll kunnu savnast til stórar hátíðarløtur. Verandi skúli er víst í gráum og nýggja fimleikahøllin er víst við grønum.



Garðarnir. Nýggju millumbygningarnir loka útirúmini millum lonirnar, soleiðis at deildirnar kunnu savnast í hugnaligum gørðum í góðari lívd. Í mun til greiðu skipanina skúlin er bygdur upp við, verða garðrúmini skapaði sum bleyt, kullut og tættvaksin skógarrúm við gøtum, hyljum og uppihaldsstøðum. Gomlu trøini verða varðveitt har tað er møguligt.



Nýggj fimleikahøll verður bygd afturat verandi aulu. Her kunnu øll savnast!

Lon 1 verður innrættað við umklæðingarrúmum, venjingarhølum og tøkni í niðaru hædd. Bólkarúm, felagsøki og umstøður til lesandi, við barr og lestrarstovu hava visuelt samanband til høllina.

Nýggja framsíðan á Frælsinum 20 vendir sær út ímóti savnandi, suðurvenda universitetstorginum. Her er hugnaligt at hittast áðrenn fyrilestrarnar og fáa sær kaffi í sólini. Kanska er tað her øll savnast og til kravgongu um nýggjar lestraríbúðir.

Lon 5, 6 og 7 hava skrivstovur, bólkarúm, fundarhøli og tænastuveitingar í niðaru hædd. Sama virksemi verður lagt afturat í millumbygninginum, og undirvísingarhøli verða í ovaru hæddunum.

Lon 1, 2, 3 og 4 verða innrættaðar við undirvísingarhølum. Í millum bygningunum verða nýggj undirvísingarhøli, sum knýta seg at lonunum við gongum.


Svalagongdin er nýggja andliti á Fróðskaparsetrinum. Hon bindur lonirnar saman og knýtir Frælsið 20 at nýggja felagsbygninginum hjá Hennig Larsen við eini taktari pergola.

Framvið verandi innandura gøtuni verða millumbygningarnir staðsettir, sum ljós gróðurhús úr timbrið. Beinleiðis atgongd er út í garðarnar. Nýggjar rampur tryggja tíðarhóskandi atkomuviðurskifti fyri øll til allar hæddir. Nýggj undirvísingarrúm verða framvið gøtuni við útsýni út til garðarnar.

Nýggju millumbygningarnir girða verandi garðar inn. Garðrúmini verða innrættaði við tættplantaðum kullutum landslagrúmum, fjøllbroytt og livandi í mun til neyvu bygningsskipanina. Møguliga eisini vitanarstøðir til útiundirvísing kunnu byggjast í gørðunum?

Felagsbygningurin

5. FRÆLSIÐ 20 Í FRAMTÍÐINI




FLEKSIBILITETUR. Við avmarkaða fólkatals-grundarlagnum í Føroyum er tað ikki møguligt at bjóða allar lærugreinar út hvørt ár. Tí er neyðugt at innrætta hølini á ein fleksiblan hátt, so tey kunnu nýtast tvørfakligt og effektivt.

Serstovurnar verða innrættaðar soleiðis at skyldar lærugreinar kunnu brúka somu høli upp á skift, tá tær verða bodnar út sum vællærugreinir ymsu árini. Hølini kunnu skipast soleiðis, at tey lættliga kunnu leggjast saman til størri rúm ella skiljast sundur eftir tørvi. Við at leggja dent á tvørfakligt samstarv, effektivisering av hølisnýtslu og burðardygd, verður møguligt at tryggja, at allir fermetrar á universitetinum verða brúktir optimalt. Hendan tilgongd fer eisini at fremja eitt meira dynamiskt og skapandi læruumhvørvi, har fakligir karmar og hentleikar verða gagnnýttir til fulnar. Avgerandi er við góðum goymsluplássi so til ber at rigga ymisku vællærugreinarnar til alt eftir tørvi.


Ein slík tvørfaklig og effektiv nýtsla av hølum hevur fleiri positiv árin. Fyrst og fremst eggjar hon til fakligt samstarv millum lærugreinar, har næmingar og lærarar fáa møguleikan at arbeiða saman um tvørfakligar verkætlanir. Hetta stimbrar kreativitet og innovatión og ger undirvísingina meira fjølbroytta og spennandi. Við einum opnum og deildum læruumhvørvi økist eisini trivnaðurin hjá lesandi og starvfólkum, tí tað sosiala samspælið verður betri, og arbeiðsumhvørvið gerst meira livandi.

NÝGGJ FLÓÐ - VATNRÆTT. Í verandi løtu enda allar lonirnar í blindni, men nýggju samanbindingarnar koma at broyta flóðið í bygninginum á báðum hæddum, soleiðis at rørslan runt skúlan verður meira flótandi. Ongin gongd endar í blindni, og ein kann flyta seg frítt runt bygningin. Øll brúka alt húsið, og tað at fremur tvørfakliga samstarvi. Samankoblingarnar loyva harumframt einum fleksibiliteti viðvíkjandi støddunum á hvørjari deild - til ber at víðka og minka deildirnar eftir tørvinum hjá deildunum.

Við hesum nýggju sambondunum kunnu deildir lættliga víðkast og minka eftir skiftandi tørvi.



Rúmlig tekning av gøtuni og nýggju bygningunum millum lonirnar, rampan tryggjar atgongd fyri øll, og lesandi og lærarar hittast í samanhangandi vatnrætta flóðinum av gongunum og felags uppihaldsmøguleikum.



NÝGGJ FLÓÐ - LODDRÆTT. Tær verandi lonirnar eru upprunaliga skipaðar við undirvísing í hægra partinum ímóti ljósinum suðureftir, og gongsøkjum í tí lægra partinum norðeftir.

Niðara hæddin av í Lon 5, 6 og hava eisini kjallara, sum fyrr hevur verið nýttur til kollegiekømur, goymslu og undirvísing. Hendan hæddin er vælegnað til gransking og fyrisiting. Her er útsýni og útgongd til garðarnar og friður til at hugsavna seg.

Í dag eru hæddirnar bundnar saman við avbyrgdum trappum í hvørjum enda av lonini. Í framtíðini er tað ynskiligt at hava eitt tættari samband millum undirvísing og gransking, og tískil er neyðugt við betri sambandi millum hæddirnar. Í kappingaruppskotinum verður víst á felags gróðurhús, opnu svalagongdin móti torginum, ein munandi størri rúmlig og visuel samanbinding. Arbeitt verður miðvíst víðari við hesari visjónini.

Svalagongdin móti torginum knýtir hæddirnar saman og styrkir sambandi millum gransking og fyrisiting á niðaru hædd og undirvísing á ovaru hædd.

Svalagongdin knýtir saman undirvísingarrúmini í lonunum á ovaru hædd og granskingina og fyrisiting á niðaru hædd.

Nýggjar serstovurnar á ovaru hædd millum verandi lonir við atgongd til svalagongdina.

Tekningin vísir niðaru hæddina við gransking og umsiting, sum er opin út til svalagongdina og er knýtt saman við undirvísingarhølunum á ovaru hædd.

Bygningarnar hjá Fróðskaparsetrinum savnast um eitt nýtt universitetstorg.

Svalagongdin er nýggja andliti hjá Fróðskaparsetrinum og vendir ímóti torginum. Her ferðast man runt um lonirnar, hittist, arbeiðir í bólkum ella lesir í ljósinum.

Pergola knýtir Frælsið 20 saman við nýggja felagsbygninginum.

NÝGGJAR FLATMYNDIR. Sum áður nevnt, er niðara hædd í Lon 5, 6 og 7 væl egnað til skrivstovuumhvørvi við gransking- og starvsfólkahentleikum. Í dag er einki samband millum hesar tríggjar lonir, men við svalagongdini og millumbygninginum fram við gøtuni, verða tær tríggjar lonirnar knýttar saman, og øll niðara hæddin verður samanhangandi.

Innrættingin av Lon 5, umfatar fleiri skrivstovur, sum eru natúrliga skipaðar í upprunaligu lestrarkømrunum. Í Lon 6 og 7 eru teir berandi veggirnir asymetriskir (sum ovast við gongsøkið og undirvísing). Her verður tað natúrligt at seta smærri einmannsskrivstovur móti norði og størri, opnari skrivstovuøki móti suðuri. Í teimum nýggju millumbygningunum móti torginum kunnu verða opin og innbjóðandi felagsøki við skrivstovum, fundarhølum, móttøku o.s.fr. við útsýni út í garðarnar. Á diagramminum er flóðið og felagsøkið víst við reyðum, grátt er skrivstovuøki, og grønt er undirvísing.

Roknað verður við nakað av niðurtøkum og broytingum í vindeygastaðsetingum í berandi inn- og útveggunum.

Á ovaru hædd er undirvísing. Somuleiðis eru nýggj stór felags uppihaldsrúm, sum skapa sambond við garðarnar (markera við reyðum á diagramminum). Undirvísingarrúmini eru í verandi lonunum og taka atlit til berandi veggirnar (grátt). Serstovur (grønar) eru settar í nýggju millumbygningarnar, og tey fakrúmini, ið krevja mest tøkniliga útgerð, atgongd o.s.fr., eru sett staðsett saman í norðara enda.

Á niðasta diagramminum sæst, nýggja høvuðsinngongdin móti torginum og felagsbygninginum. Tær sekunderu inngongdirnar eru merktar við smáum pílum, og tann stóri grøni pílurin merkir atgongd og vørumóttøka frá Handan Á, serliga til tey ”tungu” serhølini.




Diagram - niðasta hædd

Skrivstovur og gransking á somu hædd.




Diagram - ovast hædd

Undirvísing liggur -á ovaru hædd,.






Diagram - inngongd

6. UPPSKOT TIL FRÆLSIÐ 20 Í FRAMTÍÐINI

Hugskotsskitsur framleiddar við stuðning í innleiðandi brúkararundum v.m.


























Rúmini kunnu víðkast og minkast eftir tørvi


Lækkandi lendi merkir at serstovurnar eru staðsettar í trimum niveaum. Tað er natúrligt at savna skyldar lærugreinar saman - her eru vístar náttúrulærugreinarnar. Á einum øðrum stigi kundu til dømis kreativu lærugreinarnar verið savnaðar.

Flestu serstovurnar kunnu staðsetast í útnyrðingshornium við møguleika fyri góðari atgongd og levering frá parkeringsøkinum Handan Á.

SERSTOVUR eru staðsettar í nýbygningunum millum tær 7 lonirnar, har neyðugar tøkniinnleggingar kunnu setast upp, sum partur av nýggja arkitekturinum, har loftshæddin er góð og dagsljósið optimera. Tað er brúk fyri hølum til sera ymiskar undirvísingaruppgávur, alt frá alt frá listaverkstøðum, til sjúkrarøkt í seingjastovum. Harumframt kunnu framtíðar krøv og tørvur broytast, so arkitektururin er hugsaður inn frá byrjan, sum fleksibul og opin. Hølini skulu kunna lúka núverandi krøv, men eisini rúma øðrum funktiónum við tíðini.
Neyðugt er við góðum goymsluplássi í samband við hølini. Nógvar av serstovunum eru serstakar og útgjørdar við útgerð, ið ikki er nem at flyta, men tað eigur at verða kannað, um ávís høli kunnu verða tømd relativt lættliga fyri tílíkari útgerð, og fylt við øðrum - og tískil skifta millum ymisku funktiónirnar, sum hvør lestrarhálva krevur.



Rúmlig skitsa av undirvísingarhølum til sjúkraøktarfrøðilesandi við songum, eygleiðingarrúmi, goymslu og atgongd til floksrúm.



Frá innleiðandi brúkararundum er skrásett ein røð av serhølum. Fyri NÁD eru tað (bólkar á 15):

- *Ítróttarhøll (v. bummum í loftinum osv.)*
- *Tónleik*
- *Leiklist (drama)*
- *Smíð (timbur og metall)*
- *List, Handverk/List (Evning) (vátrúm)*
- *Alis- og Evnafrøði*
- *Náttúru- og Tøkni*
- *Lívfrøði*
- *Heimkunnleiki*
- *Handarbeiði*
- *Námsfrøðiliga kveiking*
- *(Fjølmiðlafak)*
- *(Tøknifrøði)*

DHS ynskir serhølir til 24-30 lesandi:

- *2 X simuleringsstovu til 5-6 sengur*
- *Ítróttarhøll*


Hjá NVD er talan um:

- *Kemi*
- *Molikylær biologi*
- *Verkfrøði/Fysikk (Stórt bassin til aldukanningar vm)*
- *El-lab (sterkstreym og veikstreym))*
- *iNova útgerðin*
- *Granskingarhøli til betong vm (betong lab)*
- *Støddfrøði frá teori til praktisk*
- *Smíð og metall verkstað*
- *(Matvørufrøði)*
- *(Havverkfrøði)*

Í komandi skrásetingini av serstovum skulu serliga krøv lýsast, alt frá vídd, innrætting, tøkni, ventilatión, atgongd, serligt innbúgv og útbunaður, hjálparhøli osv. kortleggjast.


Ítróttarhøllin skal kunna nýtast av øllum næmingunum, men í undirvísingarsamanhangi hava bæði NÁD og DHS brúk fyri høllini, umframt ymisk hjálparhølir og funktiónir. Harumframt kunnu NÁD og NVD hava møguleika fyri at nýta summar serstovur. Tað eigur at verða kannað nærri, um fleiri serstovur kunnu verða nýttar av ymiskum útbúgvingartilboðum, sum hava samlíkar tørvir.

ÍTROTTAHØLL OG AULA






















ÍTRÓTTARHØLL OG AULA. Í samband við byggingina av nýggja felgsbygninginum verður verandi fimleikahøll tikin niður, og tað verður mælt til at byggja eina nýggja høll í Fræslinum í leinging av auluni. Bæði NÁD og DHS hava tørv á eini nútímas høll í undirvísingarsamanhangi, men allir næmingar skulu eisini kunna brúka hana til samlingar og frítíð.

Sjálv høllin liggur millum auluna og eina rød av serstovum vestanfyri. Skitsan leggur upp til at hava serstovur á ovaru hædd í samband við ítrótt og fysiologi. Á niðaru hædd eru smærri salir til dans, yoga o.s.fr. - við hesi innrætting er høllin umleið 30x20

Lon 1 hevur á ovaru hæddini eitt næmingaøki við inngongdina við útsýni út í garðin og niður í ítrottahøllina. Harumfram eru skúlastovur, og á niðaru hædd eru skiftingarrúm, fitness, goymslur o.a.

Hin vakra verandi aulan er opin móti høllini. Kanska ber til at endurhugsa hana, so hon framvegis kann brúkast sum í dag, men eisini til drama og tónleik?

Nýbyggingin ímóti Frælsinum skal kunna brúkast sjálvstøðugt, so tað fær eitt alment og opið serðeykenni. Teir mongu heintleikarnir kunnu brúkast alt døgnið til lesandi, ítróttafeløg, kvøldskúlar, leiksýningar, fyrilestrar o.a. - óheft av restini av húsinum.

Her - í útnyrðingshorninum - eru serstovur innrættaðar við tilknýti til ítrótt á fyrstu hædd og smærri hølir á niðastu hædd.

Í niðaru hædd í Lon 1 verða innrættað skifitrúm, fitness, goymlsa v.m.

Tað verður opið millum aulun og ítróttahøllina. TIl serlig høvir kunnu øll lesandi og starvsfólk savnast!

Økið við verandi høvuðsinngongd frá Frælsinum verður opnað við sambandi til auluna, garðar og nýggju ítróttahøllina. Lestrarviðurskiftir og felags uppihaldsøki.


Nýggja, opna framsíðan hjá høllini móti Frælsinum.

Kann aulan fáa eina virknari leiklút í húsinum? Kanska kunnu drama og tónleik innrættast her/ nýta hana?


UNDIRVÍSINGARSTOVUR OG BÓLKARÚM























Berandi, tvørgangandi veggir í lonunum verða varðveittir, so vítt møguligt, og rúm við ymiskum støddum verða innrættaði - gjarna við møguleika fyri at leggja tey saman.

Samband verður millum tey nýggju rúmini í millumbygningunum og floksrúmini í lonunum.

Nóg mikið plássi til goymslu eigur at verða innrættað, so rúmini lættiliga kunnu nýtast til ymiskar undirvísingarhættir.

Verandi gongir verða innrættaðar við útsýni til floksrúm, klædnarúm, sitikrókar og møguleika fyri uppihaldi.

Í lonunum móti GØTUNI verða bólkarúm, vesi, goysmla og tekøkur við uppihaldsøki innrættað.

UNDIRVÍSINGARSTOVUR OG BÓLKARÚM.

Eru staðsett har tær núverandi skúlastovurnar eru - also í teimum verandi lonunum við framsíðum móti úsynningi, góðum dagsljósi og loftshædd. Tá ið endaligu ynskini um støddir og økisbýti eru kend, kann avgerð takast um, hvørji hølir skulu brúkast, sum tey eru (sjálvandi umvæld og dagførd í mun til útgerð o.s.fr.), og hvar tað skal latast upp ella veggir takast niður fyri at leggja fleiri hølir saman.

Møguleikin fyri fleksibilitet eigur at verða optimeraður - soleiðis at rúmini t.d. við foldiveggum kunnu víðkast frá at verða hóskandi til 12 lesandi heldur verða egnaði at undirvísa 24 lesandi.


Hølini verða innrættað við møblum, sum lættiliga kunnu flytast runt og setast upp í ymiskum skapi; bæði sum Teaching Lab og í vanligum undirvísingarhøpi við einkulborðum, hestaskógvi, borðbólkar til bólkaarbeiði osv. Tað eigur at verða hugsað um nógv goymslupláss í samband við hølini, soleiðis at neyðuga útgerðin og innibúgv kann lættiliga finnast fram ella verða ruddað burtur.


Bólkarúm og arbeiðsumhvørvi í ymiskum støddum og eyðkenni verða, sum stuðla formellu undirvísingarhølunum. Hesi hava ikki so stór krøv til beinleiðis dagsljós og kunnu tí staðsetast í teimum meira afturlatnu sonunum mitt í bygninginum ella í endanum av lonunum, har nýggju millumbygningarnar 'stjala' framsíðuna.

FELAGSØKI OG UPPIHALD


















Fyrisitingin í niðaru hædd heuvr samband við vakstrarhúsini og atgongd millum lonirnar

Nýggjar, tíðarhóskandi rampur eru ájavnar við GØTUNA.

Felagsøkini í vakstrarhúsunum hava útgongd til havarnar.




FELAGSØKI OG UPPIHALD. Ein týdningarmikil partur av broytingini av verandi bygningi er at leggja afturat felags- og tilhaldsrúmum. Í nýggja felagsbygninginum verður kantina, bókasavn, lesisalur o.s.fr. Hetta verða tey stóru felagsøkini fyri alt Fróðskaparsetrið, har øll kunnu savnast tvørtur um deildir. Felagsøkini á Frælsinum 20 verða hugsað sum meira lokal, minni savningarstøð í samband flóðið í bygninginum.

Í gallarínum móti torginum hittast fólk óformelt millum hæddirnar, meðan tey flyta seg runt í bygninginum. Framvið útveggjinum verða møblar, har smærri bólkar kunnu lesa og arbeiða saman.


Miðgøtan er í dag rættiliga smøl og fylt við rampum, og er mest nýtt einans til rørslu. Hon verður víðka við fimm nýggjum, størri felagsøkjum við útgongd til garðarnar undir glastaki. Her kunnu lesandi og undirvísarar hittast óformelt, savnast, drekka kaffi áðrenn næsta tíma ella sita í smærri bólkum og arbeiða.

Eisini verða smærri, óformell uppihaldsstøð og sosialar sonur, telefonboksir, lesikrókar, tékøkar og pláss til samrøður og fríløtur í hvørjari lon á báðum hæddum.

SKRIVSTOVU- OG STARVSFÓLKAHENTLEIKAR





















Á niðaru hædd í teimum nýggju millumbygningunum verða innrættað stór, fleksibul og opin fundarhøli við útgongd í garðarnar.

Ein partur av skrivstovu-økinum er í teimum nýggju millumbygningunum, har tað er atgongd til vakstrarhús og lonirnar.

Frá svalagongdini er atgongd til móttøkuna.

Í vestaru síðu av lonunum verða størri og meira fleksiibul skrivstovuøki innrættað við fundarhølum, goymslu og tekøki við møguleika fyri uppihald.

Berandi, langi veggurin í lon 6 og lon 7 verður varðveittur so vítt gjørligt og smærri PhD skrivstovur verða innrættaðar her


SKRIVSTOVU- OG STARVSFÓLKAHENTLEIKAR

Í niðaru hæddini er tørvur á ymiskum sløgum av arbeiðsplássum - frá einmannsskrivstovum, til størri øki við fleiri starvsfólkum, sum kunnu arbeiða saman. Deildirnar kunnu møguliga verða settar í hvør sína lon, men eru knýttar saman bæði ”aftanfyri” og úti í gallarínum. Hvør deild rúmar bæði minni skrivstovum, fundarhølum (4-12 persónar), gjøgnumskygd og skjólaði bólkarúm, og óformell møtistøð, goymslurúm, prentararúm o.s.fr.


Innrættingin av einari deild kundi t.d. verið 14 einmannsskrivstovur, 7 tveymannsskrivstovur og 3 fýramansskrivstovur, umframt fyrr nevndu felagsfunktiónir.


Í nýggja millumbygningunum móti torginum kunnu deildirnar deila tey nýggju gjøgnumskygdu økini við útsýni og útgongd til garðarnar. Her kunnu størri fundarúm (12-40 persónar), felagsrúm, opin kontórøkir, fyrisiting og móttøka í samband við inngongdina til torgið verða innrættað.

RAKSTUR OG VIÐLÍKAHALD + TØKNI























Møguliga kundi eitt minni verkstað verða staðsett í suður skjøldurin á Lon 4. Her er góð atgongd til kjallara og felagsbygningin hjá Henning Larsen.





Prinsipskurður í verandi lon (til dømis Lon 6)
- Tøkni verður sett upp í krúpiðkjallara.

RAKSTUR OG VIÐLÍKAHALD


Í komandi fasum verður tað eisini týdningarmikið fyri rakstur og viðlíkahald at fáa yvirlit yvir tørvin fyri ALT kampus. Partar av rakstrinum kunnu við fyrimuni savnast á einum staðið, men nógvar funktiónir og rúm skulu eisini vera staðsett miðspjadd og býtt út í deildirnar. Tað er nevnt, at ein komandi miðstøð fyri raksturin við verkstaði, vaskihøli, fundarhøli, køki o.a. kann vera í nýggja felagsbygninginum, og at ein minni støð kann verða stðasett á Frælsinum 20. Sum uppskot til kjak verður her skotið upp, at hendan kann verða staðsett í suður skjøldrinum á Lon 4, sum liggur lutfalsliga sentralt í tí samlaða kompleskinum, har tað er møguligt við vøruinnkoyring frá Handan Á. Harumframt er kjallari undir hesum langhúsi, sum møguliga kann brúkast til goymslu og tøkni.


Í fyrstu brúkararundum um rakstur og viðlíkahald er ein røð av ynskjum skrásett, sum verða tikin við í komandi arbeiði:

1: Kaffistova til smærri innanhýsis fundir við tekøki, ca. 4 fólk
2. Væntandi fleiri fólk og robott til størri tørv
3. Umrøtt, men ikki sannlíkt, ein skóleysan skúla
4. Rúm til umklæðing, vask, hvíld, tekøk
5. Rúm við industrivaskimaskinum og turkitrumlu
6. Smærri verkstøð til at seta smávegis í stand
7. Reingerð, robott til stóran part av gólvøkið
8. Fundarhøli til húsavørðar
9. Samstarv um verkstøð, umganga dupultfunktiónir
10. Serligt tilfarsval (gólv, veggir, loft)
11. Hurða- og lásaskipan
12. Goymsla tætt uppá størri rúm
13. Rusk skiljing
14. Uttandura goymslur

TØKNI

Alt Frælsið 20 fer at hava tørv á tíðarhóskandi installatiónum. Bæði verandi bygningar og nýggju útbyggingarnar skulu hava neyðga ventilatión, hita, ljós, AV o.a. - serliga tey tøkniintensivu serhølini norðanfyri. Møguliga kann ein partur av tøknini verða í verandi kjallara undir lonunum - kanska serliga undir Lon 5 og í krúpikjallarunum undir Lon 6 og 7.
Í nýggju millumbygningunum verður eisini møguleiki fyri at seta m.a. ventilatión undir tey høgu loftini. Sum við rakstri og viðlíkahaldi liggur planleggingin av tøknini eitt sindur longri frammi í tíðini, men tað eigur longu nú at verða við í programmætlanini og byggikonseptinum.







Prinsipskurður í nýggjum millumbygningi.
- Tøkni verður í loftsrúmi yvir lægri inngondarøki til undirvísingarhøli á ovaru hædd, við leiðingum til gransking og fyrisiting á niðaru hædd.


















GARÐAR. Garðarnir á Frælsinum eru í dag nakað slitnir, og krevja umfatandi endurnýggjan. Í verkætlanini verða teir ein týðandi partur av heildararkitekturinum. Har bygningarnir eru neyvir og reglufastir, kunnu garðarnir verða tað øvugta - tættir, intimir og ævintýrrík fríøki. Enn hava deildirnar ikki víst á serlig ynskir ella krøv til útirúmini - men tað kundi kanska broytt seg! Tað kann hugsast, at garðarnir verða mentir á felags brúkara-verkstovum?

Garðarnir kunnu meira enn at verða støð har man kann hvíla seg, taka sær av løttum ella njóta ein kaffimunn í sólini. Her kunnu skapast rúm fyri uttandura undirvísing, har serstovurnar verða opnaðar, og lesandi kunnu byggja, royna ella granska okkurt úti. Kanska kunnu garðarnir rúma ítrótti, landbúnaði, drívhúsum ella plantufrøði við nógvum blómum? Teir kundu eisini hýst djórum, ið hevði givið umhvørvinum ein serligan dám.


Tað hevði eisini verið vert at kanna møguleikan fyri fríari og almennari atgongd til garðarnar. Hugsast kann, at teir knýtast saman við umkringliggjandi býarrúminum gjøgnum durar ella gongugøtur, soleiðis at teir eisini gerast ein sameindur partur av býarlívinum?

Á hesi síðuni verða tvær skitsur vístar av teimum báðum sunnastu havunum. Á næstu síðu verða teir tríggir norðastu ”sergreina-havarnar” og til seinast ein hugskotsskitsa til al-ment, parkøki á verandi parkeringsplássi móti Á Frælsinum (tá ið parkering er flutt í komandi parkeringskjallaran.

Garð-tekningarnar skitserað fleiri hugskot, ið kunnu seta dreymarnar um felagshavar í gongd. Tekningarnar eru innleiðandi ætlaðar sum ein byrjandi hugskotsbanki.









BOTANISKUR HAVI

Havin, sum er tættast við nýggju høvuðsinngongdina í svalagongdini. ”Tað føroyska landslagið” umboðar: bakkar, vatn, skóg, klettar og plantur.




SANSA HAVI


Garður til kreativt virksemi. Skal leggja upp til samrøður, rørslu, sang v.m.




Útgongd frá vakstrarhúsinum við GØTUNA.



Útgongd frá vakstrarhúsi við GØTUNA.




Útgongd frá vakstrarhúsi við GØTUNA.




ÍTRÓTTAR GARÐUR

Leggur upp til kropsligt virksemi tætt við nýggju ítrottahøllina.




LANDBÚNAÐAR GARÐUR

Her kann man læra oog menna landbúnað/gartnara/gagnurta-garður



VATN GARÐUR

MIiðdepil fyri hav, vatn og fiskiskap. Rannsóknir við havdjórum, plantum, aldukanningum v.m.



GARÐUR MÓTI Á FRÆLSINUM Í strategisku heildarætlanini frá 2018 er parkering savnað í parkeringskjallara á eystaru síðu av kampus. Soleiðis verður økið framman fyri Frælsið 20 tøkt og umskapað til eitt opið og alment øki. Ein kann ímynda sær eitt tættvaksi, organiskt suður- og vesturvent rúm til hvíld, fríløtur, spæl og ítrótt. Parkeringspláss verða til fólk ið bera brek og møguleiki fyri av- og áseting. Garðurin kann rúmliga hanga saman við tí komandi universitetstorginum, sum liggur í hjartanum av kampus og møguliga fáa ein meira býarlkendan og fastan dám.

SAMLEIKI. Fróðskaparsetur Føroyar fevnir, sum áður nevnt, um fleiri bygningar umboðandi ymsik arkitektonisk rák. Hetta merkir at eisini framtíðar bygningssamleikin hjá setrinum, er samansettur, eitt konglomerat sum lýsir ymisk tíðarskeið og virksemi. Tað øvugta av td. Aarhus Universitet við gulu tigulsteinunum hjá Kay Fisker. Hinvegin hava vit møguleikan við felagsbygninginum hjá Henning Larsen og nú Frælsið 20 at seta dám á heildina og vísa á framtíðar bygningar.

Burðardygd verður tann týdningarmesti og sjónligi felagsnevnarin, og landslagsskipanin fer at spæla ein avgerandi leiklut í at áseta samleikan fyri kampus. Við íblátstri frá klassiskari føroyskari byggisiðvenju kunnu vit skapa eitt serstakt og intimt lestrarumhvørvi. Vit ímynda okkum gras á takinum, timbur, grót, gøtur, varðar og vatn, ull og litir sum reytt, grønt, svart, hvítt, blátt, ið saman skapa eina sjónliga føroyska mentan.

Fróðskaparsetrið skal vera nakað serligt, tí tað er bæði intimt, føroyskt og samstundis nýtmótans. Ímynda tær, at tú kanst lyfta høvdið upp frá tínum elektronmikroskopi og síggja høsn skrukka í garðinum - ein serstøk samanrenning av tøkni og náttúru.

Kunnu vit longu nú byrja at skapa dreymar um framtíðar kampus og arbeiða við einari sniðhandbók, ið samantvinnur arkitektur, landslag, býarrúm, litir og tilfar? Og hvussu kunnu ymsu deildirnar, ið hava hendan felags karm, skapa sín egna samleika, men samstundis varðveita síni sereyðkenni?













